Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 26.09.2023
Mál nr.: 23/16224
Málsviðgjørt: JEK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
Stk. 3. Persónbilar, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift, og sum verða skrásettir í: 1) 2025 skulu rinda 7,5% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við kr. 100.000 og 11,25% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum omanfyri kr. 100.000, 2) 2026 skulu rinda 15% av avgjaldsskylduga virðinum til og við kr. 100.000 og 22,5% av avgjaldsskylduga virðinum omanfyri kr. 100.000, 3) 2027 skulu rinda 22,5% av avgjaldsskylduga virðinum til og við kr. 100.000 og 33,75% av avgjaldsskylduga virðinum omanfyri kr. 100.000, og 4) 2028 og fylgjandi ár 30% av avgjaldsskylduga virðinum til og við kr. 100.000 og 45% av avgaldsskylduga virðinum omanfyri kr. 100.000.	Í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 26 frá 27. februar 2023, verður § 3, stk. 3 orðað soleiðis: "*Stk. 3.* Persónbilar, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift, og sum verða skrásettir í: 1. 2024 skulu rinda 0% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við kr. 200.000 og 45% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum omanfyri kr. 200.000, 2. 2025 skulu rinda 7,5% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum lægri enn kr. 100.000, 11,25% í virðisgjaldi av virðinum millum kr. 100.000 og kr. 200.000 og 45% í virðisgjaldi av virðinum omanfyri kr. 200.000, 3. 2026 skulu rinda 15% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum lægri enn kr. 100.000,

	22,5% í virðisgjaldi av virðinum millum kr. 100.000 og kr. 200.000 og 45% í virðisgjaldi av virðinum omanfyri kr. 200.000, 4. 2027 skulu rinda 22,5% í virðisgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum lægri enn kr. 100.000, 33,75% í virðisgjaldi av virðinum millum kr. 100.000 og kr. 200.000 og 45% í virðisgjaldi av virðinum omanfyri kr. 200.000, og 5. 2028 og fylgjandi ár 30% av avgjaldsskylduga virðinum lægri enn kr. 100.000 og 45% í virðisgjald av virðinum kr. 100.000 ella hægri.”